betri DEILDIN

# LEIKSKRÁ

24. september 2023

SKRÁ NR. 11

GUNDUR E. PETERSEN NR. 14




ARGJA BÓLTFELAG 1973

# 23. UMFAR

# HAVSBRÚN

P/F Havsbrún • P.O. Boks 81 • 530 Fuglafjørður
tel. 41 44 00 • fax 41 44 01
havsbrun@havsbrun.fo • www.havsbrun.fo




SVERRI EGHOLM/PORTAL.FO

# Ítróttarfelag Fuglafjarðar

Fløtugerði - 530 Fuglafjørður
tel. 228771 if@if.fo www.if.fo

**Útgevari og ábyrgd**
ÍF-fótbóltur - Atli Petersen

**Sniðgeving og uppsetan**
Maibritt P. Bærentsen


betri.fo
Betri tannár
Til tín millum 13 og 17 ár
Kort
Netbanki
Nýtslukonta
Uppsparingarkonta
Boðtænasta
Fá ein ryggsekk, tá tú bíleggur títt fyrsta kort
Vitja eina av deildum okkara
betri

# INNIHALD


- Dysturin í dag
- Støðan í Betri deildini
- TEAM ÍF
- TEAM AB
- Dómarar
- Onnu Larsen til minnis
- Toppskjúttar eftir 22 umfør
- Søgubrot 8
- Stuðulsrenningin 2023
- ÍF-sangurin




INTERSPORT®
intersport.fo

taf.fo
the athlete's foot®



BIRGIR PETERSEN

# DYSTURIN Í DAG

**Vælkomin til dyst í Betri-deildini.**
Seinasta umfar taptu vit ímóti 07 Vestur í Fløtugerði, og var hetta ein av okkara gyltu møguleikum at lyfta okkum uppum niðurflytingarstrikuna, nú kappingarárið lækkar móti endanum. Okkara spæl var á góðari leið, men vit megna ikki at skora mál, og er hetta eitt mynstur, sum vit hava sæð stóran part av árinum. Eisini kemur tað ofta at vera lið í tyngra endanum av stigatalvuni, sum hava ringt við at tekkjast dómarinum, men er tað eisini nattúrligt at dømingar oftari virka

harðar, tí man er nógv í verjustøðu. Hetta hevur okkara unga lið ferð eftir ferð fingið at merkja, brotspørk og útvísingar í banar langar eru prógv um hetta. Nú taka vit ímóti AB, sum liggja eitt stig frammanfyri okkum og er í næstan líka trongum skóm, sum vit. Dysturin er ein beinleiðis bardagi um at sleppa av aftasta plássinum.

So nú er við at vera seinasta útkall hjá okkum, tí nú resta 5 dystir í og hava vit kanska ta lættasta programmi, og er lagnan enn í okkara hondum.

**Góðan dyst øll somul.**
**Koyrið á drongir**





VÓNIN®

MILLUM FREMSTU MENNARAR,
FRAMLEIÐARAR OG VEITARAR AV
DYGDARGÓÐUM FISKIREIÐSKAPI

# EFTIR 22 UMFØR

# STØÐAN

## Í BETRI DEILDINI HJÁ MONNUM

| NR | LIÐ | D | V | J | T | VM | TM | MM | S |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | KÍ | 19 | 17 | 1 | 1 | 49 | 13 | +36 | 52 |
| 2 | B36 | 21 | 16 | 1 | 4 | 46 | 17 | +29 | 49 |
| 3 | HB | 20 | 15 | 2 | 3 | 56 | 15 | +41 | 47 |
| 4 | Víkingur | 21 | 13 | 3 | 5 | 52 | 20 | +32 | 42 |
| 5 | 07 Vestur | 21 | 9 | 4 | 8 | 34 | 32 | +2 | 31 |
| 6 | EB/Streymur | 20 | 6 | 2 | 12 | 22 | 37 | -15 | 20 |
| 7 | B68 | 21 | 4 | 6 | 11 | 21 | 37 | -16 | 18 |
| 8 | TB | 21 | 4 | 4 | 13 | 13 | 46 | -33 | 16 |
| 9 | ÍF | 21 | 4 | 0 | 17 | 19 | 58 | -39 | 12 |
| 10 | AB | 21 | 3 | 1 | 17 | 16 | 53 | -37 | 10 |

WWW.DYSTIR.FO

## 23. UMFAR

| | |
|---|---|
| 24.09.23 | B68 - EB/Streymur |
| 24.09.23 | ÍF - AB |
| 24.09.23 | Víkingur - 07 Vestur |
| 24.09.23 | TB - KÍ |
| 25.09.23 | B36 - HB |

## 24. UMFAR

| | |
|---|---|
| 30.09.23 | HB - B68 |
| 30.09.23 | 07 Vestur - AB |
| 01.10.23 | KÍ - ÍF |
| 01.10.23 | TB - EB/Streymur |
| 01.10.23 | Víkingur - B36 |

# KES.FO

HVS - VENTILATIÓN - HITAPUMPIR - SERVICE

Hjá Klima Energi Service leggja vit okkum eftir at veita dygdarvørur og -tænastur innan hita, ventilatión og orkuoptimering. Harafturat bjóða vit eftirlit av hitapumpum og ventilatiónsskipanum, bæði til privat og vinnu.

Tørvar tær eina nýggja hitapumpu ella ventilatións- og luftskiftisskipan, ella vilt tú hava vegleiðing um orkuskifti, ert tú vælkomin at seta teg í samband við okkum.




INFO@KES.FO - WWW.KES.FO - 258030

| | |
|---|---|
| Tóri **Traðará** | 1 |
| Elvio **Gelmini** | 2 |
| Jan **Ó. Ellingsgaard** | 3 |
| Tóri **N. Olsen** | 4 |
| Pól Jákup **Lundsbjerg** | 5 |
| Karl **A. Løkin** | 6 |
| Dánjal **á Lakjuni** | 7 |
| Ruben **Møller Nielsen** | 8 |
| Jhon Edy **Mena** | 9 |
| Jóhan **Petersen** | 10 |
| Markus **á Lakjuni** | 11 |
| Hans Jákup **J. Lervig** | 12 |
| Jákup **J. Nolsøe** | 13 |
| Gundur **E. Petersen** | 14 |
| Jákup **í Lambanum** | 15 |
| Líggjas **Heðinsson** | 16 |
| Jóhann **Højbro** | 17 |
| Petur M. **Lundsbjerg** | 18 |
| Rúnar **Johnsson** | 19 |
| Aron **Kensson** | 20 |
| Rógvi **Matras** | 21 |
| Elias **Lervig** | 22 |
| Hans **Jacobsen** | 23 |
| Gonzalo **Zárate** | 24 |
| Bergur **Jacobsen** | 25 |
| Sámal **Zachariassen** | 34 |

Høvuðsvenjari: **Aleksandar Jovevic**
Hjálparvenjari: **Bartal Eliasen**
Málmansvenjari: **Erling Joensen**
Fysiskur venjari: **Gudmundur Danielsen**
Fysioterapeutur: **Jónfríð Hansen**
Liðleiðari: **Rói D. Olsen**
Liðleiðari: **Heðin L. Olsen**
Liðleiðari: **Fríði R. Petersen**

**INNIHALD**

| | |
|---|---|
| Antonio **Borelli** | 1 |
| Jens **Olsen** | 2 |
| Ramzi **Idrissou** | 4 |
| Sam **Pollard** | 5 |
| Bjarni **Skála** | 6 |
| Brian **Jakobsen** | 7 |
| Santiago **Lebus** | 8 |
| Ragnar **Skála** | 9 |
| Tóki **á Lofti** | 10 |
| Teitur **Olsen** | 11 |
| Marius **Kryger Lindh** | 12 |
| Tróndur **á Høvdanum** | 14 |
| Dánjal **Danielsen** | 15 |
| Rói **Zachariasen** | 16 |
| Bartal **Petersen** | 17 |
| Jákup P. **Breckmann** | 18 |
| Filip **í Liða** | 20 |
| Gunnar **Reynslág** | 21 |
| Rói **Nielsen** | 22 |
| Viktor **Benediktsson** | 23 |
| Beinir **Ellefsen** | 24 |
| Heðin **Stenberg** | 25 |

Venjari: **Símun Eliasen**
Hjálparvenjari **Morten Overgaard**



DÓMARI

Jóhan Hendrik **Ellefsen**

magn




Green Marine Divers

Tlf.: +298 77 00 60



# ONNU LARSEN

## TIL MINNIS!

Tað er gott at kenna seg takksaman og hepnan, eftir at hava kent eina menniskju í gjøgnum eitt langt lív. Hetta var kenslan eg sat eftir við, nú boðini bórust um, at Anna Larsen var farin. – Ein kensla av takksemi og hepni hóast sorg og sakn!

Havi vita um Annu Larsen frá barni av. Men tað var ikki minst ígjøgnum okkara felags hjartabarn, ÍF, at okkara vegir krossaðust mest.

Var so heppin at sita í nevnd saman við Annu. Altíð fús og nærløgd til at taka tung tøk, felagnum at frama – eitt nú at skipa fyri eydnuhjóli og lutaseðlasølu, at hjálpa til við innkrevjingini og at taka sær av klæðum.

Men hetta nærlagni og ídni røkk eisini út um tíðina, hon hevði sum nevndarlimur. Tað hevur felagið merkt øll árini, og tað kundi eg so mangan sanna eisini. Bæði sum leikari og sum venjari – í fótbólti, í flogbólti og í hondbólti.

Nú, eg havi skavast eitt sindur við søguna hjá ÍF, og tí hugt fundarbøkurnar ígjøgnum, havi eg rent meg í nøkur nøvn, sum aftur og aftur verða nevnd. Nøvn á fólkum, sum eftir bestu sannføring hava lagt nógva orku í og sett nógva tíð av til felagsins besta í meir enn hálva øld.

Eitt av hesum nøvnum er Anna Larsen!



*ÍF nevndin 1979-80 saman við Ronny Gunnarsson.*
*Myndin er tikin í oktober 1980*

Men Anna var ikki einsamøll um sítt nærlagni! Petur, maðurin, var eisini altíð stuðlandi í hesum arbeiðinum – bæði praktiskt og fíggjarliga. Tey bæði vóru ein fyrimynd fyri okkum øll! Men ikki minst vóru tey ein fyrimynd fyri teirra børn, sum eisini hava verið ÍF og arbeiðinum innan ítróttina í bygdini ein trúgvur og hollur stuðul.

Fyri júst fimm árum síðani eydnaðist tað mær at hava eitt prát við Annu, sum eg festi á band. Eitt prát um ÍF og ítróttina í hennara barna- og ungdómsárum. Ein sera góð og gevandi løta í hugnaliga heiminum á Trøðni. Ein samrøða, sum er eitt sera virðismikið íkast til søguna um ÍF.

Góðu tit, Jákup Frants, Atli, Gunnvá, Randi og Rógvi við familjum! Árini vóru har, men kortini er saknurin svárur. Máttu tit kent styrki og troyst í Honum, sum øllum valdar!

Friður veri við minninum um Annu Larsen!

Tórshavn, 21. september 2023
Petur Simonsen

Brekkutún 4 | 188 Hoyvík | Tel. +298 30 88 00 | torshavn@samskip.com | www.samskip.fo



TÍTT FLUTNINGSFELAG

SAMSKIP

SPEKT

løggildir grannskoðarar

**Tórshavn**
Staravegur 17
Tel. 34 34 34

**Klaksvík**
Stangaskákið 1
Tel. 34 34 35

spekt@spekt.fo
www.spekt.fo



# TOPP10

## MÁLSKJÚTTAR Í BETRI DEILDINI

| NR | NAVN | MÁL |
|---|---|---|
| 1 | Páll **Klettskarð** (KÍ) | 16 |
| 2 | Adrian **Justinussen** (HB) | 15 |
| 3 | Sølvi **Vatnhamar** (Víkingur) | 13 |
| 4 | Mikkel **Dahl** (HB) | 12 |
| 5 | Martin **Klein Joensen** (Víkingur) | 11 |
| 6 | Valerijs **Sabala** (B36) | 10 |
| 7 | Árni **Fredriksberg** (KÍ) | 10 |
| 8 | Uros **Stojanov** (07 Vestur) | 8 |
| 9 | Bjarki **Nielsen** (B36) | 8 |
| 10 | Brian **Jakobsen** (AB) | 7 |

WWW.DYSTUR.FO

SØGUBROT 8

# ÍTRÓTTAR-HÚSIÐ

## partur 1/2

EFTIR: PETUR S. SIMONSEN

Ynskið um eisini hús við vøllin í Fløtugerði við m.a. skiftingarrúmum, mann helst vera líka gamalt sum vøllurin sjálvur, sum varð tikin í brúk í 1956.

Hetta dróg tó út. Ymisk uppskot vóru um hvussu og hvat. Hondbólturin og tey fólkini, sum raðfestu hondbóltin hægri enn fótbóltin, høvdu síni ynski, meðan fótbólts-fólkini raðfestu annarleiðis. Og kortini vóru nógv tey somu fólkini, sum vóru virkin í bæði hondbólti og fótbólti.



*Uppskot til ítróttarhøll, sum JP Gregoriussen teknaði í 1963 og uppskotið til ítróttarhús, sum Mikkjal Jacobsen teknaði í 1966.*

Á sumri í 1966 verður farið undir at byggja Ítróttarhúsið og ítróttarhøllin, sum var upp á tal, bleiv slept.

Men Ítróttarhúsið frá 1966 er ikki bara ein sólskinssøga – heldur ikki fyri fótbóltin.



*Myndin er tikin stutt frammanundan, at Ítróttarhúsið varð tikið niður í oktober 2017*

**Tú kanst lesa meira** um hetta
á heimasíðuni hjá ÍF www.if.fo.
Vel "Felagið" og síðani "Søgubrot".
Hini sjey søgubrotini eru eisini at finna har.

NÝRÙM

Teknistova
einar@nyrum.fo
tlf 78 88 99



# STUÐULS-RENNINGIN

2023

Hóast veðurforsagnirnar boðaðu frá keðiligum veðri, var fínasta renniveður uppi í Fløtugerði mikudagin kl 16:30. Stilt og regn. Nógv børn vóru møtt upp. Vit taldu í felag niður frá tíggju, og tá klárt var at renna, tendraðu við góðan tónleik og settu minutturið á 30 minuttir. Betri deildar menninir stóðu við mállinjuna og strikaðu armarnar á børnunum so hvørt sum tey runnu. Dámurnar stákaðust í køkinum, summar við kaffi og aðrar við pappírsarbeiði. Tað er nógv at halda skil á ein slíkan dag. Børnini komu við lepum úr øllum heraðshornum, og tað er ikki uttan orsøk. Fyrst og fremst fyri at stuðla ÍF, men eisini fyri at verða við í lutakasti, tí tá liðugt var upptalt, vórðu allir leparnir koyrdir í ein svartan sekk, har ein heppin vinnari av einum hotell uppihaldi varð funnin.

Vinnarar vóru eisini funnir millum rennararnar. Bæði teir ið runnu flest metrar fyri ávikavist 15+ og 14-, og tann, ið savnaði flest pengar. Vinnararnir ið runnu mest vóru Bárður Ólavson, Kári Zachariassen og tann ið savnaði flest pengar var Fabian Florinson. Eftir renningina fingu øll sunkist og karamell og høvdu vit eina lítla hugnaløtu inni í snotuliga ÍF-húsinum. Sí myndir á næstu síðu.






BMT

Byggimestarin Thomsen

Tel 580044
Alt kann gerast

TAKK FYRI STUÐULIN

**Leiðandi reiðarí**
**í norðurhøvum**




VARÐIN
P/F Varðin | Garðabrekka 4 | FO-510 Gøtu | Tel 610600
vardin@vardin.fo | www.vardin.fo

OKKARA KJARNUØKI

**GRANNSKOÐAN**
ROKNSKAPARHJÁLP
**SKATTUR**
VIRKISRÁÐGEVING
**BÓKHALD**
MEIRVIRÐISGJALD

Skalt tú meta um framtíðina, mást tú kenna fortíðina.

januar
LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI

WWW.JANUAR.FO

SENDISTOVAN

# SYNGIÐ VIÐ

Í Fuglafirði mangan dystin leika
Í reyðum, hvítum klæðum eru tit
Á vølli allir leikarar nú reika
Og vinna dystin – ja, tað vilja vit.

**Vit eru ÍF-fan**
**Vit vita hvat ein kann**
**Vit eru best, og vinna hvat sum helst**
**Vit hava sett sum mál, at vinna hvørja sál**
**Nú Fuglafjørður hevur nátt sítt mál.**

Í deildini vit skulu verða bestir
Og vinna alt ið vinnast kann í dag
Jú, ÍF-leikarar teir eru treystir
Og fólkini tey gerast øll so glað.

**Vit eru ÍF-fan ...**

Á vøllinum vit skulu standa saman
Um tað nú ikki gongur sum tað skal
Á bakkanum í álvara og gaman
Og vóna at tað gondur okkum væl.

**Vit eru ÍF-fan ...**

Vit armarnar í lofti nú upp hevja
Og kunnu ikki standa her í frið
Tá sjálvandi vit gullið kunnu tevja
Nú eiga vit jú Føroya besta lið.

**Vit eru ÍF-fan ...**